# Tvingsilssøla yvir útróðrarbát

Eftir áheitan Inga Højgaard, advokati, Advokatfelagið við Strond 4, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260, vegna veðhavara, verður hildin tvingsilssøla

**fríggjadagin, tann 3. februar 2006, kl. 13.30,**

á Dómaraskrivstovuni í Tórshavn, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, (AS 2-35/2005) yvir útróðrarbátin

**"M/B Eik Helgadóttir"**

ið Sp/f H.K. undir konkurs er eigari av. Báturin hevur kenningsstavir XPMW, og havnakenningstavir FD 65.

Báturin er smíðaður úr furu, bygdur í Romsdal í Noregi í 1964 og heimahoyrandi í Fuglafriði. Báturin er merktur 19,99 brt.

Báturin verður seldur sum hann er og liggur við útgerð sum t.d. línuspæli v.m.

Fyrireikandi fundur verður hildin á Dómaraskrivstovuni **fríggjadagin, tann 27. januar 2006, kl. 13.00.**

Einhvør, ið heldur seg hava rættindi yvir bátinum ella møguligari útgerð, verður biðin um at møta.

Avrit av uppskoti til tvingsilssølutreytir kunnu fáast við at venda sær til advokat Inga Højgaard.

Skjøl í sambandi við tvingsilssøluna liggja frammi til skoðan á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn.

Føroya fútarættur, tann 16. desember 2005

**Fíggjarmálaráðið**

# Fíggjarmálaráðið og Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum søkja eftir fulltrúum

**Arbeiðið í Fíggjarmálaráðnum**
Arbeiðið í Fíggjarmálaráðnum fevnir um ráðgevandi, fyrisitingarligar og analytiskar uppgávur á teimum økjum, ið ráðið umsitur, t.e. at:

- Ráðgeva landsstýrismanninum um fíggjar-, skatta-, avgjalds-, og kapitalmarknaðarmál og viðgera innkomin mál
- Fyrireika uppskot til nýggjar lógir og lógarbroytingar
- Loysa tvørgangandi og samskipandi uppgávur
- Gera analysur, langtíðarætlanir og tryggja, at hesar verða framdar
- Ráðgeva og leiðbeina stjórnarráðum og stovnum.

**Arbeiðið á Lønardeildini**
Arbeiðið á Lønardeildini fevnir í høvuðsheitum um sáttmálasamráðingar, málsviðgerð og ráðgeving í arbeiðsrættarligum og setanarrættarligum spurningum, t.e. at:

- Ráðgeva stjórnarráðum, kommunum, stovnum og feløgum og avgreiða fyrispurningar frá teimum
- Gera vegleiðingar og rundskriv um lønar- og setanarviðurskifti
- Tulka lógir, avtalur og tænastumannalóggávuna.
- Svar spurningum í fyrisitingarrætti og arbeiðsmarknaðarlóggávu
- Gera sáttmálaar við fakfeløg

**Førleiki**
Vit vænta, at umsøkjarar hava útbúgving av hægri lærustovni, eitt nú cand. jur., cand. merc., cand. polit. ella líknandi. Aðrar útbúgvingar saman við hóskandi royndum kunnu eisini koma upp á tal. Vit rokna eisini við, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva í arbeiðsbólkum.

**Setanartreytir**
Setanartreytir og løn eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanin fevnir um alt Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini.

**Vit bjóða**

- Arbeiði á høgum fakligum stigi, og tí eru góðir møguleikar fyri persónligari og fakligari menning
- Sjálvstøðugt starv, sum tú í stóran mun skapar sjálv/ur
- Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har tú arbeiðir nógv saman við teimum politisku myndugleikunum
- Starv, sum til tíðir kann vera krevjandi, men sum samstundis er áhugavert við nógvum samskifti úteftir
- Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgving.

**Umsókn**
Umsókn saman við CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

**Fíggjarmálaráðið**
Postboks 2039
FO-165 Argir

Frestin at søkja er hósdagin ***5. januar 2006 kl. 12.00.***
Størvini verða sett skjótast tilber.

Vilt tú vita meira um størvini, kanst tú ringja til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmálastjóra, á tlf. 35 20 20 ella Snorra Fjallsbak, stjóra á Lønardeildini á tlf. 35 22 00.

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

# Avloysari fyri skrivstovufulltrúa

Avloysarastarv sum skrivstovufulltrúi í hálva tíð í Løgmansskrivstovuni er leyst at søkja við freist 10. januar 2005. Starvið fevnir í høvuðsheitum um vanligar skrivarauppgávur, so sum rættlesa røkja ymsar databasur (acsess), leggja til rættis fundir og skriva fundarfrásagnir.

Sí nærri á www.tinganes.fo undir størv.

# Stongt

er frá og við fríggjadegnum 23. desember og latið verður uppaftur mánadagin 2. januar 2006 til vanliga tíð

Studulsstovnurin

Hoyvíksvegur 72 · Postsmoga 3279
FO-110 Tórshavn
telefon 356800 · faks 356801
t-postur: studul@studul.fo
heimasíða: www.studul.fo

# Saltspreiðarar og saltkassar




**Kaj Andreasen & Co**
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

# Programmedarbeiðarastørv

Í Kringvarpi Føroya eru nøkur programmedarbeiðarastørv leys at søkja fyri medarbeiðarar, sum eru farnir úr starvi.

Starvslýsingarnar eru at síggja á heimasíðunum hjá kringvarpinum **svf.fo** og **uf.fo**

Umsóknirnar skulu vera Kringvarpi Føroya í hendi í seinasta lagi týsdagin 27. desember 2005.

**Kringvarp Føroya**
Norðara Ringvegi · Postboks 1299 · 110 Tórshavn · Tel 34 75 00

# Hús í Vestmanna

til sølu.

**Tlf. 424600 ella 229113**

**MATRIKULSTOVAN**
J. Broncksgøta 25
Boks 327 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 357900 • Fax 357901

**Stongt verður millum jól og nýggjár.**